# Ljungberg í EM-vanda

Svenski Fredrik Ljungberg breyt eitt rivjabein í dysti fyri West Ham í ensku Premier League um vikuskiftið, og skaðin kann hava við sær, at Ljungberg ikki fær spælt í EM-endaspælinum í summar. Ljungberg er ein av týdningarmiklu spælarunum á svenska landsliðnum, og har vóna tey sjálvsagt, at Ljungberg kemur fyri seg til endaspælið í juni.



# Bayern manglar eitt stig

FC Bayern hevur beina kós ímóti týska meistaraheitinum. Um vikuskiftið vann Bayern heili 4-1 á Stuttgart, og nú manglar Bayern bert eitt stig í fyri at kunna vissa sær týska meistaraheitið. Bayern hevur verið í flokki fyri seg í týsku kappingini í ár, og tað kemst millum annað av keypinum av fleiri stórspælarum farna summar.



*Andrew av Fløtum og HB trýstu nógv fyri steðgin, men seinna umfarið var tað B68, sum sat á tí mesta*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

B68-HB (0-0):

# Sigursrøðin steðgaði á Svangaskarði

**Tað eydnaðist ikki HB at vinna fjórða dystin upp í slag í Formula-deildini, tá teir vitjaðu á Svangaskarði í gjár. Gestirnir vóru leikliga omaná, men tóku ikki av, tá møguleikin beyðst. B68 vann eisini síni fyrstu stig í hesum kappingarárinum**

*Uni Holm Johannesen*

Jú, tað var eyðvitað, hvør var vónbrotin og hvør var fegin eftir dystin á Svangaskarði í gjár. Í leikaratunlinum í felagshúsinum hálsfevndust toftamenninir, meðan gestirnir úr HB fóru beina leið inn í skiftirúmið.

Sigursrøðin hjá eldra høvuðsstaðarfelagnum stegaði í gjár, tá tað endaði við nullloysn á Toftum. HB hevur verið stórspælandi í fyrstu dystunum, og mest óvæntaða úrslitið hetta vikuskiftið var uttan iva á Svangaskarði. Hóast gestirnir vóru leikliga omaná, so høvdu teir trupult at senda framvið Vlada Filipovic í málinum hjá toftamonnum.

B68 vann sær samstundis síni fyrstu stig í ársins útgávu av Formuladeildini – til stóru gleði hjá fjepparunum.

## Lítið at bjóða

Allir tríggir framherjarnir hjá B68, Ameth Keita, Jacob Bymar og Jóan Símun Edmundsson, vóru smáskaddir dagarnar undan hesum dystinum, og Bill M. Jacobsen, venjari, hevði av somu orsøk nakað at hugsa um. Hann valdi Keita og Bymar frá byrjan, men tað var skjótt, at 16 ára gamli Jóan Símun Edmundsson slapp á vøllin. Jacob Bymar, sum tóktist væl upplagdur, noyddist at lata seg útskifta eftir fáum minuttum, og tað tók broddin úr framrættaða spælinum hjá B68. Saman við restini av heimaliðnum, so reiðist Edmundsson av álvara í seinna umfarinum. Hóast sín unga aldur, so høvdu Fróði Benjaminsen og Rasmus Nolsøe torført við at fáa tamarhald á honum eftir steðgin.

Fyrri hálvleikur hevði lítið at bjóða. Verjuparturin hjá toftamonnum var lítið sannførandi í løtum, og serliga Jákup á Borg var ofta spældur ígjøgnum í vinstru. Men júst sum allar atsóknirnar hjá HB, so manglaði neyvleikin. Andrew av Fløtum átti næskastu royndina hjá gestunum undan steðginum, tá Christian Høgni Jacobsen slapp í gjøgnum í vinstru. Hann legði bóltin fyri føturnar á framherjanum, sum var staddur á fimmmetra markinum, men Vlada Filipovic vardi fyri royndini.

B68 hevði onga roynd á málið hjá gestunum í fyrra umfarinum. Poul Thomas Dam var ikki tryggur sum vongverji í vinstru, men heimaliðið legði ongantíð trýst á hann. Tað var eisini vongverjin, sum var orsøkin til frísparkið, sum var vandamesta royndin hjá B68 í fyrra hálvleiki. Tað sendi Badara Diedhiou væl oman fyri málið.

## B68 sínar møguleikar

Longu fyrstu minuttirnar eftir hvíldina góvu Øssur Hansen og Jákup á Borg boð um, at seinni hálvleikur fór at verða meira hendingaríkur. Fyrrverandi og núverandi landsliðsleikararnir vóru í hornatøkum, har hvørgin vildi sleppa troyggjuni á hvør øðrum. Hetta hóast, at bólturin langt síðan var spældur víðari. Gult kort til báðar, og leikararnir tóktist meira uppsettir.

Soleiðis skuldi eisini verða. Serliga var uppleggið hjá HB framrættað, og teir sótu á øllum fyrstu longu løtuna. B68 skapti einki á leikhálvuni hjá gestunum, og tað einasta sum líktist einum møguleika, var, tá sjálvasti Arnbjørn Danielsen, sum spældi í miðverjuni, legði inn fyri málið úr vinstru. Tróndur Vatnhamar loftaði tó bóltinum uttan trupulleikar.

B68 reistist aftur so líðandi, men júst sum í fyrra hálvleiki hjá gestunum, so manglaði avgerandi sendingin ella síðsti neyvleikin.

Rógvi Poulsen var aftur millum teir fyrstu ellivu hjá HB, men hann megnaði ongantíð at gera veruliga vart við seg. Argjamaðurin var sjáldan vandamikil, og tað var bara einu ferðina, at hann setti Øssur Hansen av í fyrra hálvleiki. Hendrik Rubeksen loysti eisini unglingin av miðskeiðis í seinna umfarinum.

Rúni Nolsøe hevði helst fegin vilja sett framrættaða vongverjan, Pætur Jørgensen, á vøllin seinastu minuttirnar, men orsaka av skaða noyddist Hans á Lag at loysa Rasmus Nolsøe av.

Hóast HB var nógv á bóltinum, so var ikki vandi á ferð framman fyri málinum hjá Vlada Filipovic. Einki mál var skotið á Svangaskarði, og í leikaratunlinum eftir dystin var eyðsæð, hvør hevði vunnið og tapt stig.

Sigursrøðin hjá HB steðgaði á Svangaskarði, men høvuðsstaðarfelag er framvegis fremst í Formuladeildini. B68, sum longu hevur spælt móti oddaliðunum EB/Streymi, NSÍ og HB, skulu komandi vikurnar standa sína roynd. Longu mikukvøldið bíðar Skála teimum.

# Sjey eru í

**Meðan summi í Føroyum tosa fyri, at Føroyar skulu trekkja seg úr altjóða fótbólti, so finnast tað onnur fótbóltssambond, sum stríðast fyri at sleppa upp í altjóða fótbólt**

FÓTBÓLTUR

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Hóast mótgongdina síðstu árini, so eru tey flestu, sum varða av fótbóltinum í Føroyum, fegin um, at bæði landsliðini og feløgini hava altjóða avbjóðingar. Tó eru neiligar kreftir í samfelagnum, sum ynska, at vit skulu niðurleggja hetta altjóða samstarvið, soleiðis at okkara leikarar ikki koma at hava nakran altjóða motivasjónsfaktor. Samstundis er tað onnur fótbóltssambond, sum stríðast ein næstan ómøguligan dyst fyri at vinna somu altjóða viðurkenning, sum Føroyar fingu í 1988.

## Grønland

Grønland er dømið, vit kenna best. Í 1998 vórðu grønlendingar avvístir, tí teir ikki eru limir í Sameindum Tjóðum. Fótbóltur verður bara spældur í Grønlandi 3-4 mánaðir um árið, og tað verður bara spælt á grúsvøllum. Langt er at ferðast millum ymisku bygdirnar og býirnar, og tí verða teir flestu dystirnar hjá feløgunum bara ímóti feløgum úr sama býi ella øki. Tað er bara til endaspælið, sum gongur uppá skift kring Grønland, at liðini, sum spæla seg til endaumfarið, møta liðum úr øðrum pørtum í Grønlandi. Endaumfarið plagar at verða avgreitt innanfyri eina viku. Ikki er óvanligt, at liðini brúka tvey samdøgur til at ferðast til endaspælið. Og ikki er tað uttan vanda. Í 2005 druknaðu tríggir grønlendskir fótbótsspælarar, sum sigldu aftur frá einum útidysti í egnum báti. Grønland hevur tikið lut á øllum oyggjaleikum, men manslið-ið var ikki við á Rhodos í summar. Grønlendska fótbóltssambandið hevði bara ráð at senda eitt lið, og tískil var avrátt, at kvinnurnar skuldu sleppa at umboða Grønland, meðan menninir sótu heima hesuferð. Grønlendska fótbótssambandið manglaði 150.000 kr. í tøkum peningi fyri at bæði landsliðini kundu verða við á oyggjaleikunum. Kendasti fótbóltsspælarin, sum er føddur í Grønlandi, er fyrrverandi danski landsliðsleikarin, Jesper Grønkjær, sum er føddur í Nuuk. Kanska hann verður at síggja á oyggjaleikunum í framtíðini?

## Sámaland

Sámiska fótbótssambandið var avvíst av FIFA í 1996. Høvuðssorsøkin var, at talan var meira um ein ættarbólk enn eitt land. Sámarnir halda til í bæði Noregi, Svøríki, Finnlandi og Russlandi. Uml. 40.000 búgva í Noregi, meðan uml. 30.000 búgva í hinum trimum londunum. Kendasti leikarin av sama-ætt er Blackburn-spælarin, Morten Gamst Pedersen, og samarnir eru ivaleysir í, at Morten Gamst Pedersen fer at umboða samiska landsliðið, tá hann er ov gamal til at spæla við norska landsliðnum! Sámalandið hevur eitt sterkt landslið, tí teir hava vunnið á Estlandi, sum Føroyar skal møta í venjingardysti í næstum. Formaðurin í samiska fótbóltssambandinum, Leif Isak Nilut hevur vónir um, at Sámaland kann spæla ein venjingardyst ímóti Føroyum. Men tá hevur FSF so ikki grett orð um - enn. Sámalandið vann seinastu VIVA-kappingina, sum er heimsmeistaraskapið fyri landslið, sum ikki eru viðurkend av FIFA.

## Tibet

Tibet hevur verið partur av